# Opel GT – bilurin undir presendingini



*Ovara myndin sýnir Opel Gt frá 60-unum. Undir presendingini er nýggi Opel GT, sum verður frumsýndur á bilaframsýningini í Genéve*



*Opel GT verður avdúaður á bilaframsýningini í Genéve fyrst í mars. Bilurin hevur 2.0 litur 4 syl. ECOTEC turbo bensinmotor við 260 hk og koyrir frá 0-100 km/t upp á minni enn 6 sekund*



*Designið er bæði nýtt og gamalt. Skermarnir hava somu linjur sum Opel Gt frá 60-unum. Hesin hevur 18” hjól og tvey útstoyt*

**Herfyri høvdu vit eina mynd av einum nýggjum Opel GT, sum stóð undir eini presending, klárur at avdúka á altjóða bilaframsýningini í Genéve. Men vit hava longu nú fingið myndir av bilinum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Opel GT er gjørdur við gjørdur við tí fyrra Opel GT, sum varð gjørdur frá 1968-73, sum fyrimynd. Bilurin verður avdúkaður á bilaframsýningini í Genéve síðst í hesum mánaðinum.

Nýggi bilurin, ið verður drivin av bakhjólunum, hevur 2.0 litur 4 syl. ECOTEC turbo bensinmotor við 260 hk og koyrir frá 0-100 km/t upp á minni enn 6 sekund.

Designið líkist Opel GT, sum fyrstu ferð var sýndur fram á Frankfurt Motor Show í 1965, og kom á marknaðin í 1968. Opel GT var framleiddur í yvir 100.000 eindum, tey umleið fimm árini hann var á marknaðinum. Síðan hevur bilurin verið eitt samlaraobjekt um allan heimin.

Opel GT, ið skal framleiðast á eini verksmiðju í USA, kemur á marknaðin á vári 2007.

*Kelda: GM Danmark*

# Nýggjur Volvo S80 í summar

**Volvo almannakunngera nú fyrstu myndirnar av nýggja S80, sum kemur á marknaðin í summar við nýggjum designi og trygd og koyrieginleikum í heimsklassa**



*Nýggi Volvo S80 kemur á marknaðin í summar við nýggjum designi og trygd og koyrieginleikum í heimsklassa. Sum nakað nýtt fæst hann við 6 syl. rekkjumotori*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í summar kemur ein heilt nýggjur Volvo S80 á marknaðin. Bilurin verður frumsýndur á altjóða bilaframsýningini í Genéve síðst í februar og fyrst í mars.

S80 hevur allar tær nýggjastu og mest framkomnu trygdarskipanirnar hjá Volvo, sum t.d ein fartpilot sum automatiskt heldur frástøðu til bilin sum koyrir frammanfyri, og eisini eina heimsnýggjheit sum nevnist PCC ( Personal Car Communication) við hópin av intelligentum funktiónum, sum t.d registrerar hjartaslagið og ávarðar um ein persónur goymir seg í bilinum.

Volvo S80 kemur við tveimum nýggjum motorum, einum 3,2 litur 6 syl. rekkjumotori við 238 hk, og einum 4,4 litur V8 motori við 315 hk. Annars fæst hann eisini við 2,5 litur 5 syl. turbo bensin við 200 hk, og 2,4 litur turbodiesel við 185 hk.

S80 er ein luksusbilur í dýrara klassanum, men Volvo vænta sær nógv av bilinum, serliga á amerikanska marknaðinum.